ChevronTexaco:

# Nýtt oljufund gevur nýggjar vónir

**Hjá amerikanska oljufelagnum ChevronTexaco eru tey sera fegin um úrslitið av seinastu boringini á leiðini millum Hetland og Føroyar. Felagið ásannar, at tess strategi við at velja Atlantsmótið út sum eitt av kjarnuøkjum tess í heimin hevur verið røtt. Umframt boringina hevur felagið eisini gjørt áhugaverdar vísindaligar kanningar á havbotninum og í havumhvørvinum rundan um boriholið. Hetta fyri at tryggja sær, at alt verður gjørt fyri ikki at nerva umhvørvið**



*Rosemary Johnson stendur á odda fyri leitingini á Atlantsmótinum og hon vitjaði á oljuráðstevnu her í mai. Tá segði hon við Sosialin, at boringin í Rosebank/Lochnagar økinum fór at hava avgerandi týdning eisini fyri teirra luttøku í føroysku útbjóðingini. Positiva úrslitið hevur so gjørt, at felagið saman við hinum trimum feløgunum hava søkt um teigar hinumegin markið eisini*

OLJUFUND
*Jan Müller*

Mikudagin kunngjørdi stóra oljufelagið ChevronTexaco, at tað saman við norska Statoil, danska Dong og eysturríkska OMV hevði gjørt eitt stórt oljufund á Atlantsmótinum, ella neyvari 9 fjórðingar eystan fyri føroyska markið. Í tíðindaskrivi frá ChevronTexaco verður sagt, at fundið varð gjørt í heyst, tá boriskipið West Navigator boraði ein 3600 metrar djúpan brunn. Rakt varð við bæði olju og gass í tveimum støðum, Rosebank og Lochnagar. Einki verður sagt um, hvussu stórt fundið er annað enn, at tað er eitt týðandi fund. Keldur vilja tó vera við, at talan kann vera um hálva milliard tunnur av olju, og tað merkir, at hetta verður eitt tað størsta fundið, sum er gjørt á bretskum øki í mong ár.

Hjá ChevronTexaco eru tey væl nøgd við nýggja fundið, sum eftir øllum at døma hevur fingið felagið at ásanna, at teirra strategi við at velja Atlantsmótið út sum eitt av sínum kjarnuøkjum í heiminum, hevur verið røtt. Nógvir pengar eru brúktir her, og nú vísir tað seg, at hetta hevur verið ein røtt satsing. George Kirkland, forseti fyri ChevronTexaco Overseas Petroleum sigur, at fundið er grundarlag fyri framhaldandi vøkstri í økinum og skundar undir kanningar og leiting á Atlantsmótinum sum eitt økið við »high-impact opportunities around the world.« Gary Luquette, forseti og stjóri fyri »ChevronTexaco Upstream Europe« sigur, at tey eru sera fegin um úrslitið av boringini, sum gevur teimum nýggjar vónir. Hetta er eitt framúr høvi og ger, at felagið fer at halda fram við sínum virksemi í økinum og gera íløgur her.

Hann vísir eisini á, at felagið í boringini á so djúpum vatni í einum heilt nýggjum umhvørvi ger alt fyri at tryggja sær, at alt fer fram, sum tað eigur, tá hugsað verður um árinið á umhvørvið. Í hesum sambandi hevur felagið útvegað sær týðandi vitan um lívið á havbotninum rundan um boriholið. Ein frágreiðing fer at verða almannakunngjørd um júst henda partin av arbeiðinum, sum hevur til endamáls betur at skilja vistfrøðina í tí lítið kenda djúphavsumhvørvinum. Til endamálið hevur felagið brúkt ein ómannaðan og sera væl útgjørdan kavbát, sum kann taka myndir og gera vísindaligar kanningar heilt niður á stór dýpi. Í hesum føri var talan um eitt dýpi uppá 1100 metrar.

Sigurd í Jákupsstovu:

## Gleðiligt fyri Føroyar



*Sigurð í Jákupsstovu, stjóri á Oljufyrisitingini*

– Tað er gleðiligt fyri oljuleiting í heila tikið og fyri Føroyar, at tað vísir seg at vera hald í teimum tíðindunum, sum vit hava hoyrt sigur Sigurð í Jákupsstovu, stjóri á føroysku Oljufyrisitingini í eini viðmerking til tíðindini um, at tað nú verður staðfest, at eitt stórt oljufund er gjørt skamt frá markinum. Hann leggur tó aftrat, at hetta broytir so einki uppá 2. útbjóðing. Tær umsóknirnar eru longu komnar og verða viðgjørdar í løtuni. Hann vil ikki gera fleiri viðmerkingar.

Arbeitt verður annars við umsókunum til 2. útbjóðing. Fleiri av feløgunum hava verið á fundi saman við fólkunum á Oljufyrisitingini, og hetta arbeiðið heldur fram komandi vikurnar eisini. Ætlanin er at lata loyvini í januar mánað. Ógreitt er enn nær, men Sosialurin hevur áður frætt, at talan verður um tann 18. januar ella har um leið.

# DONG sær stórar møguleikar

**Seinasta fundið hevur fingið danska oljufelagið Dong at staðfesta, at økið millum Føroyar og Hetland er eitt av teimum mest týðandi leitiøkjunum í Europa**



*Søren Gath Hansen, stjóri í Dong: – Fundið gevur okkum størri vónir um alt økið*

OLJUFUND
*Jan Müller*

Danska oljufelagið DONG, sum gerst alt meira virkið á Atlantsmótinum, eigur 10% av fundinum, sum er gjørt við føroyska markið. ChevronTexaco eigur 40%, Statoil 30% og OMV 20%. Søren Gath Hansen, stjóri fyri oljuleiting hjá felagnum sigur, at hetta fundið er við til at styrkja olju- og gassvirksemið hjá felagnum í einum øki, sum helst verður eitt av teimum týdningarmestu fyri framleiðslu av olju og gassi í Europa.

Eisini leitistjórin Jan Terje Edvardsen, sum stendur fyri tí praktiska arbeiðinum á Atlantsmótinum, er sera fegin um nýggja oljufundið: – Hetta er eitt úrslit av eini miðvísari leitistrategi í økinum, og skulu nú fleiri brunnar borast fyri at meta um kelduna. Hetta fundið skundar eisini undir víðari leiting í økinum millum Føroyar og Hetland, har vit síggja góðar møguleikar fyri fleiri nýggjum olju og gassfundum.

Dong upplýsir, at feløgini í brunninum longu áðrenn fundið varð gjørt, tryggjaðu sær týðandi teigar rundan um Rosebank/-Lochnagar økið. Haraftrat er felagið við í føroysku útbjóðingini. Dong hevur annars víkðað sítt virksemi á norskum øki. Herfyri keypti felagið lutin hjá BP í gasskelduni Ormen Lange og nú um dagarnar fekk tað tillutað fýra nýggj leitiloyvi á norska landgrunninum.




*Kortið vísir kjarnuøkini hjá Dong og staðið har stórt oljufund er gjørt við føroyska markið*